## Bjargingarætlan kann skapa

Bjargingarætlanin, sum amerikansku myndugleikarnir fyrireika, kann verða við til at markera eitt vendipunkt í altjóða fíggjarkreppuni. Tað heldur toppanalytikarin hjá Nordea Bank, Anders Matzen. Ætlanin tók skap seint í gjárkvøldið og hevur síðani ført til framgongd á partabrævamarknaðunum. – Hendan ætlanin kann púra vist verða við til at skapa rógv á fíggjarmarknaðunum og harvið forða fyri, at tamarhaldið á kreppuni verður mist, sigur Anders Matzen við politiken.dk. Tá stjórnin yvirtekur neyðstødd aktivir, leysgevur tað bankunum at gera nýggjar handlar. Misálitið á bankarnar eigur at hvørva, tá vánaligu aktivini verða beind burtur. Ætlanin viðførir kortini eina risastóra rokning til amerikanska skattaborgaran. Nordea sammetir við eina fyrri líknandi bjargingarætlan, sum í vavi svaraði til 9% av amerikanska BTÚ. Tá yvirtók stjórnin aktivir fyri 520 milliardir dollarar við einum endaligum tapi upp á 125 milliardir dollarar.



# toyggj er søga



*Hugsingur er ikki um at framleiða mjólk í Skúvoy, men seyður og ungneyt til sláturs eru grundarlagið undir landbúnaðinum. - Í ár havi eg sjey ungneyt til sláturs, og komandi ár havi eg tíggju, sigur Harry Jensen, bóndi í Skúvoy*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



Tað eru nú eini trý ár, síðan Harry endaliga tók yvir festið hjá bróðuri sínum, Arna Jensen, sum annars er útbúgvin lærari. Arni og familjan fluttu av oynni og búsettu seg í Leirvík.

- Eg sigldi í Grønlandi um tað mundið, tá eg byrjaði at hjálpa beiggja mínum, og seinni tók eg so yvir festið hjá Arna, sigur hann.

### Eingin mjólk

Í Skúvoy er einki mjólkneyt eftir, og seinastu kýrnar í oynni mjólkaðu til húsbrúks.

Við gomlu mjólkablikkunum fóru eisini mjólkneytini.

- Sum tíðin leið, bar slett ikki til at hava mjólkneyt í oynni. Í fyrsta lagi er tað rættiliga bundisligt at skula mjólka morgun og kvøld, og sum tíðin leið komu krøv um, at mjólkarbilur skuldi heinta mjólkina. Bóndir sluppu ikki at stoyta mjólkadunkarnar í mjólkabilin, og við hesi broyting bara ikki til longur at hava mjólkneyt og selja mjólk úr oynni.

Harry Jensen sigur, at tað soleiðis eru mong ár síðan, at skúvoyingar kundu selja mjólk inn á meginlandið, og hann heldur ikki, at nøkur mjólkakvota er eftir í oynni í dag.